Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 **Fax.** 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Fíggjarlógin helt ikki – aftur fleiri pengar

Oddagrein

HÓAST vit bara eru komin í áttanda mánað, er tann fimta eykajáttanarlógin á veg. Hetta tykist løgið, tí føroyski almenningurin hoyrdi ikki um annað, enn at fíggjarlógin skuldi leggjast so neyvt, at tað skuldi næstan ikki gerast neyðugt við eykajáttanarlógum í hesum fíggjarárinum.

HESUFERÐ eru tað fyrst og fremst útreiðslur til almannamál, sum standa við stórum tølum á komandi eykajáttanarlóg. Talan er um lógarbundnar útreiðslur, sum tað almenna hevur skyldu at gjalda. Tí má Karsten Hansen aftur lyfta lokið uppfrá, sum hann annars sigur seg sita so tungt á. Nú er Almanna- og heilsumálastýrið komið eftir, at játtanin í ár fer ikki at røkka, og tí verður biðið um heilar 40 milliónir krónur meira. Hetta eru rættiliga skelkandi tøl, tí við nútímans teldutøkni skuldi ikki verið so torført at framrokna tær ymisku útreiðslurnar á fíggjarlógaruppskotinum.

SO er spurningurin, um tað ikki hevur borið til at framrokna hesi tøl meira gjølliga, ella hevur Almanna- og heilsumálastýrið ætlað tølini ov lág fyri ikki at fara út um karmin, sum landsstýrið í felag royndist at semjast um, áðrenn endaliga uppskotið til fíggjarlóg varð prentað og lagt fyri Løgtingið. Ætlanin hevur kanska verið at broyta lógir, soleiðis at útreiðslur vórðu spardar. Men slíkar lógarbroytingar hava vit ikki sæð. Líka lítið sum vit hava sæð aðrar fráboðaðar lógarbroytingar. Tað er at skilja, at útreiðslur eftir forsorgarlógini vuksu, tá landið lág í djúpari kreppu fyri seks-sjey árum síðani. Men at hesar støðugt vaksa, meðan landið sambært tíðindum og hagtølum svimur í hunangi, er ikki skiljandi.

ALT málið við øllum eykajáttanarlógunum tykist løgið. Partvíst tí at landsstýrið skuldi reka ein neyvan fíggjarpolitikk. Harafturat skuldi sparast, og fyri at spara, skuldu lógir broytast, men einki er broytt, og nú er neyðugt við meiri peningi. Ein økt játtan í ár merkir sum oftast eina upp aftur størri játtan næsta ár, um ikki onkur lógaráseting, sum kostar nógv, verður broytt.

NÓGV av hesum fíggjarlógararbeiðnum – og reypinum – er tí ein sjónleikur uttan sín líka. Fyrst skal fíggjarlógin helst ikki vaksa – ella bara vaksa nøkur fá prosent. Tí verða treingir karmar lagdir, sum embætisfólk brúka nógva orku fyri at halda seg innanfyri, tá tølini skulu setast á. Men tá tølini ikki halda, verða eykajáttanarlógir lagdar fram, og upprunaligi karmurin helt ikki kortini, tí hann var ov trongur. Tað er sjálvandi gott at seta upp ein trongan karm, so fíggjarviðurskiftini ikki fara á glið. Men karmurin má vera realistiskur, tí bara í fjør og ár eru einar 250 milliónir játtaðar á eykajáttanarlógum. Og tað kann ikki kallast góður fíggjarpolitikkur.

Sosialurin

Ung kvinna noktar seg seka í stórari hashsmugling

Málið um eina 33 ára gamla kvinnu, sum er ákærd fyri at hava smuglað fleiri kilo av hashi seinasta árið, kom fyri í Føroya Rætti týsmorgunin

STEFAN Í SKORINI

Fýra ákærur vórðu lisnar upp úr ákæruritinum í rættarhølunum, og kvinnan noktaði seg sekan í trimum av teimum, meðan hon játtaði at hava framt brot á lógina um rúsdrekkakoyring.

Hinar tríggjar ákærurnar vóru av meira álvarsamum slagi, og hon noktaði seg eisini seka í teimum. Verjin mældi til, at ákærurnar ímóti henni verða sleptar.

Fyrsta málið snúði seg um, at kvinnan skuldi havt smuglað hash við skipi úr Danmark til Føroyar. Ákærin førdi fram, at hon hevði goymt hashið í eykahjólinum í bilinum, sum hon hevði leigað í Føroyum og havt við sær til Danmarkar. Tá hon so var komin til Føroyar, hevur ein persónur hjálpt henni við at fáa hashið úraftur hjólinum. Eigarin av bilinum játtar, at eykahjólið ikki var í bilinum, tá hann varð latin innaftur. Ákærda kvinnan sigur seg einki kenna til hash í eykahjólinum. Eisini sigur hon seg ongantíð hava roykt hash.

Í næsta málinum varð ført fram, at kvinnan hevði hjálpt til við at smugla 3 kilo av hashi til Føroyar á sumri í fjør. Hetta varð farið fram, við at hon og ein annar persónur høvdu verið eftir rúsandi evnunum í Vestmanna, har ein dani hevði givið teimum tað. Danin var komin til landið við flogfari hjá Atlantic Airways. Hashið var í eini leðurtasku, sum síðani varð tikin til Havnar, har tað skuldi verða selt.

Sum prógv í hesum málinum nýtti ákærin nakrar útskriftir frá Føroya Tele, sum vísa, hvar ávísar fartelefonir hava verið brúktar. Kvinnan vildi hinvegin verða við, at fartelefonin kundi verið nýtt av einum og hvørjum og noktaði eisini at hava nakran kennskap til tað, sum ákærin vil vera við er farið fram.

Fyri nøkrum mánaðum síðan var húsarannsókn, har kvinnan búði. Í samband við málið eru fleiri fólk avhoyrd.

Triðja ákæran var, at kvinnan og drongur hennara hava hótt fólk eftir lívinum, men ákærda noktaði seg seka. Ákærumyndugleikin vil hava kvinnuna revsaða fyri at hava hótt vitnini eftir lívinum. Dómarin segði tó um ta triðju ákæruna, at ákæruritið ikki var serliga greitt á hesum økinum.

Hetta málið er framhald av teimum húsarannsóknum, sum løgreglan hevur gjørt í Norðoyggjum fyrr í ár. Kvinnan varð framstillað í rættinum 1. juni í ár, og hevur verið varðhaldsfongslað síðani. Ikki fyrr enn nú, tríggjar mánaðar eftir kemur málið fyri í rættinum. Ikki øll vitnini vóru til staðar, tá rættarmálið kom fyri.

Viðmerking:

Greiðari støðutakan frá politiskari síðu

Føroya Arbeiðsgevarafelag metir at ongin orsøk er at stuðla gransking uttanlands, táið vit sjálvir hava tørv á henni

Fyri tveimum árum síðan var nógv kjak um gengransking í Føroyum. Ein verkætlan saman við Íslendingum kundi fara í gongd, men avgjørt at bíða við at gerða nakað ítøkiligt, m.a. fyri at fáa eitt kjak um etisku viðurskiftini, sum eru tengd at slíkari gransking. Men lítið og einki hevur verið at hoyrt um málið síðan. Nú frættist, at líknandi gransking fer fram, tó ikki í Føroyum, men uttanlanda. Og tað er væl at merkja blóðroyndir og upplýsingar um føroyingar, sum er grundarlagið undir hesari ganskling uttanlands, skrivar Vinnuhúsið.

Positiva ávirkan

Føroya Arbeiðsgevarafelag metir málið hava týdning, tí eitt munagott granskingarumhvørvið í Føroyum hevði eisini havt positiva ávirkan á t.d. matvørugransking, sum gerst ein alsamt meira týðandi táttur í kappingarførleikanum hjá vinnuni. Sum gongdin er nú, so ber ikki á tann bógvin, at hetta grannskingarumvørvið fæst til vega í Føroym. Samstundis mugu vit ásanna, at ongin orsøk er at stuðla gransking uttanlands, táið vit sjálvir hava tørv á henni.

Arbeiðsgevarafelagið sóknast eftir greiðari støðutakan til hetta mál frá politiskari síðu, og givið er, at skilagott hevði verið at tikið málið upp til viðgerar aftur, bæði millum politikkarar, vinnu og borgarar. Og verður hetta ikki gjørt skjótt, so er hesin møguleikin gloppin okkum av hondum, verður sagt í tíðindaskrivi frá Vinnuhúsinum.

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo

Løgtingslógir ivasamar mótvegis mannarættindunum

Fleiri løgtingslógir eru soleiðis orðaðar, at spurnartekin kann setast við, um tær ikki beinleiðis stríða móti altjóða mannarættindum

JOHN JOHANNESSEN

Mannarætturin at verja privatlívið verður í fleiri førum brotin í føroyskum løgtingslógum.

Hetta er føroyska grundlógarnevndin komin til, nú grundlógararbeiðið er komið væl áleiðis.

Grundlógarnevndin vísir á fleiri dømi, har ivasamt er, um løgtingslógir ikki eru í beinleiðis stríð við donsku grundlógina og altjóða mannarættindi.

Sjónvarpsgjaldið grundlógarbrot

Eitt av dømunum er løgtingslógin frá 1998 um kringvarp. Í grein 20, stykki 2 í hesari lógini stendur, at landsstýrismaðurin í loftmiðlamálum ásetur sjónvarpsgjaldið fyri eitt ella fleiri ár í senn eftir tilráðing frá Sjónvarpi Føroya og ásetur nærri reglur um gjaldsskyldu, innheinting av gjøldum, avgreiðslugjald og eykagjald fyri ov seint goldið sjónvarpsgjald.

Í grein 21, stykki 1 verður síðani staðfest, at øll, sum útvega sær sjónvarpstól ella tól, sum koma undir gjaldsskylduna sambært grein 20, stykki 1 skulu boðá Sjónvarpi Føroya frá beinan vegin.

Hesar báðar partar av lógini heldur grundlógarnevndin vera á markinum til at bróta reglurnar í grundlógini, ið verja okkum ítmóti, at fólk treingja seg inn á privatlívið.

Í lógini um kringvarp eru nevniliga ongar ásetingar um, hvussu sjónvarpsgjaldið skal heintast inn. Tí ber til hjá Sjónvarpinum at koyra eina herðferð við, at fólk gingu frá hurð til hurð og kannaðu, um fólk áttu sjónvarp, eins og Sjónvarpið gjørdi seinasta vetur.

Kom Sjónvarpið fram á fólk, sum høvdu sjónvarp, men sum ikki høvdu goldið sjónvarpsgjald, kundi Sjónvarpið senda málið til innheintingar.

Krevur loyvi frá dómara

Strangt tikið hevði tað borið til at fingið stóru rokningina fyri órindað sjónvarpsgjald ógildaða við støði í grundlógini, um vit høvdu fingið eina stóra rokning undir herferðini hjá Sjónvarpinum seinasta vetur.

Danska grundlógin sigur nevniliga heilt greitt, at ein stovnur ikki hevur loyvi at gera kanningar inni hjá fólki, uttan dómari hevur givið loyvi til tess. Bústaðurin hjá tí einstaka skal kennast sum friðarstaður, sjávt um tann einstaki fremur lógarbrot.

Tískil kundu vit strangt tikið kært Sjónvarpið fyri ein dómstól í sambandi við herferðina seinasta vetur og fingið rokningina ógildaða. Dómstólurin kundi í ringasta føri verið mannarættindadómstólurin í Strasbourg.

Navnalóggávan ivasom

Í fleiri førum ber eisini til at seta spurnartekin við, um føroyska navnalóggávan fylgir mannarættindunum.

Føroyska navnalóggávan sýtir nevniliga fólki at kalla børn ávís nøvn, ið málfrøðingar ikki hava góðkent, sjálvt um familjan hevur borið ávísu nøvnini gjøgnum fleiri ættarlið.

Tað er eftir føroysku navnalóggávuni til dømis ikki loyvt at eita Christian, men bert Kristian, hóast tað væl ber til at benda tað fyrra á sama hátt, sum tað seinna. Hetta heldur grundlógarnevnin kann vera í stríð við mannarættindini, um navnið hevur nógv at siga fyri tann, ið ynskir at uppkalla onkran.

Grundlógarnevnin fer í næstum regluliga at kunna um ymisk mál, ið viðvíkja eini komandi føroyskari grundlóg fyri at skapa kjak um hesa viðurskifti.



Jóannes Hansen greiddi á tíðindafundinum hjá grundlógarnevndini í gjár frá um persónlig mannarættindi
Mynd: Álvur Haraldsen

Taka almenningin við í grundlógararbeiðið

Grundlógarnevndin er farin undir regluligar tíðindafundir, har ymisk evni verða viðgjørd fyri at skapa alment kjak um grundlógararbeiðið

JOHN JOHANNESSEN

Í gjár hevði grundlógarnevndin fyrsta tíðindafundin í eini røð av tíðindafundum, ið skulu skapa alment kjak um sjálvt innihaldið í einum uppskoti til eina Føroyska grundlóg.

Jóan Pauli Joensen er formaður í grundlógarnevndini. Hann leggur stóran dent á at fáa í lag alment kjak um grundlógararbeiðið
Mynd: Álvur Haraldsen

Fyrsti fundurin snúi seg um persónlig mannarættindi, og var tað Jóannes Hansen, samfelagsfrøðingur, ið legði fram ymsar áskoðanir um evnið.

Jóannes Hansen legði stóran dent á trupulleikan við, at almennir stovnar ofta gera kanningar inni hjá privatum uttan rættarúrskurð. Galdandi grundlóg krevur nevniliga, at eingin húsarannsókn, haldleggjan, brævakanning ella avlurting fer fram uttan rættarúrskurð, ella tá »særegen undtagelse« loyvir tí.

Men hóast hetta, loyva bæði fólkatingið og løgtingið ferð eftir ferð almennum myndugleikum at fremja slíkar kanningar uttan rættarúrskurð.

Jóannes Hansen vísti á, at elnevndin til dømis kann senda fólk uttan rættarúrskurð inn á einstaklingsogn at kanna, um ein elinleggjari hevur útint eitt innleggingararbeiði á nóg góðan hátt. Hetta kann nevndin í prinsippinum gera mitt á nátt við heimild í lógtingslóg, hóast grundlógin sigur nakað annað.

Næsti tíðindafundurin hjá grundlógarnevndini verður týsdagin í næstu viku, og fer Ingibjørg Berg tá at greiða frá um politisk mannarættindi.

Shetland Cruise 2000 sumarið www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag

Gisting á hotelli
(í lágarstíð) er einans ... 864,- fyri hvønn

Gisting á vallaraheimi
(í lágarstíð) er einans ... 691,- fyri hvønn

Privat gisting
(í lágarstíð) er einans ... 819,- fyri hvønn

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum stødum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.

Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo